Í 200 ár hava ikki so nógvir amerikanarar latið verið við at valt sum tey seinastu 9 árini. Vøran, sum politikarar í hesum londum selja, tykist at vera so vánalig, at tað er ikki vert at keypa hana.

## Ætlanin við bókini

Noreena Hertz sigur, at hetta er heimurin hjá teirra tigandi kollveltingini, sum hon ætlar sær at granska. Málið er at skilja henda heimin og hvagar hann tykist at bera okkum: Ein heimur, har stórfyritøkurnar eru bæði sterkari og ríkari enn tjóðirnar. Har _ av amerikanarum halda, at vinnan hevur fingið ov stórt vald á ov mongum av lívsins viðurskiftum. Og har færri og færri fara á val, hóast valstríðið gerst meira og meira ágangandi.

*Eg ætli mær ikki at bera ein antikapitalistiskan boðskap fram, skrivar Noreena Hertz. Kapitalisman er eftir øllum at døma tann besta skipanin at skapa ríkidømi við. Fríhandil og opin kapitalmarknaður hava skapt ein einastandandi búskaparligan vøkstur um meginpartin av heiminum. Bókin er heldur ikki ætlað at vera fíggindalig mótvegis vinnulívinum. Undir ávísum marknaðartreytum er vinnan fúsari enn myndugleikarnir at taka sær av heimsins trupulleikum.*

*Heldur ikki ætli eg mær at hálova statinum. Jú, eg ætli mær at argumentera fyri, at staturin hevur ein týðandi leiklut í samfelagnum, men eg ivist í evnum hansara at spæla leiklutin.*

*Endamálið við bókini er at vera fyri fólkinum, fyri demokratinum og fyri rættvísi. Eg fari at seta spurnartekin við ta moralsku grundgevingina fyri einum slag av kapitalismu, sum eggjar stjórnum til at selja sínar borgarar fyri eitt gott orð, bjóða rættargildinum av í einum heimi har fá vinna og mong tapa, avdúka hvussu Tann Tigandi Kollveltingin setir demokratiið í vanda, pástanda at tað liggur eitt grundleggjandi ósamsvar í hjartanum á lat-standa-til-kapitalismuni, at staturin setir sín egna tiluverurætt í váða við at gera seg sjálvan so lítlan, meðan stórfyritøkurnar yvirtaka leikpallin. Eg ætli mær at kanna, hvat hendir við einari verð, har vit ikki longur kunna líta á, at staturin røkir okkara áhugamál, har sjálv orsøkin til at fara í kríggj móti Irak fánaði til frama fyri vinnulig áhugamál, og har ódemokratiskar kreftir – stórfyritøkurnar – eru í ferð við at yvirtaka leiklutin hjá myndugleikunum. Eg ætli mær at*



*Búskaparfrøðingurin John Maynard Keynes skapti eina nýggja læru, tá amerikanski búskapurin skuldi fáast á føtur. Men í dag er hann mest av øllum átøkur eini fótnotu í búskaparfrøðini*

*kortleggja ta ótamdu jagstranina eftir profitti. Eg ætli mær at konfrontera tey, sum verja valagn við, at tað er eitt slag av talu- og skrivifrælsi, og tey, sum verja ikki-uppílegging í viðurskiftini hjá øðrum londum vit, at tað gagnar ikki teirra handilsligu áhugamálum,* skrivar Noreena Hertz um sínar ætlanir við bókini, sum hesi úrdrøg verða gjørd burturúr. Hon heldur fram:

*Gongdin 20 tey seinastu árini, tá politikararnir eru komnir undir valdið hjá stórfyritøkunum, byrjaði við Margaret Thatcher í Bretlandi og Ronald Reagan í USA og hevur síðani vaksið sum ein hydra, ein ormur við níggju høvdum, við ymiskum positivum og negativum skapi. Av tí at stjórnirnar ikki so frægt sum viðurkenna, at ein tigandi kollvelting hevur verið, er vandi fyri, at tær oyðileggja ta tigandi avtaluna millum stat og borgara, sum liggur í fólkaræðisins hjarta. Ein høvuðspartur av bókini snýr seg um at rannsaka hesa gongd og avleiðingarnar av henni.*

*Støðan er hættislig í dag. Gera vit einki, bjóða vit ikki Teirri Tigandi Kollveltingini av, so er alt mist. Vit fara at síggja, at inntøkumunurin er ikki bara ringur fyri tey fátæku, men eisini tey ríku. Tað er vandamikið fyri øll, at grundarlagið undir politiskari stýring verður máað burtur. Ein heimur, har George W. Bush fær eina lóg fyri og aðra eftir samtykta til frama fyri stórfyritøkurnar, har Rupert Murdoch hevur størri vald enn Tony Blair og vinnulívið setir politisku dagsskránna, er bæði ræðandi og ódemokratiskur.*

*Mítt tema er, hvussu Tann Tigandi Kollveltingin snínkti seg inn á okkum, hví hetta hevur so stóran týdning, og hvat vit kunna gera við tað,* skrivar Noreena Hertz í innleiðandi kapitlinum. Síðani fer hon undir eina gjøllari viðgerð av tí, sum í høvuðsheitum longu er nevnt. 2. kapittul kallar hon "Lívið í einari materialistiskari verð". Her er eitt úrdrag úr tí kapitlinum:

## Gongdin í Bhutan

Kongaríkið Bhutan er eitt sjálvstøðugt fúrstadømi í Himalaya millum Tibet og India. Har búgva 600.000 fólk, sum eru millum tey fátækastu í heiminum. Landið hevur valt at avbyrgja seg og hevur tí í øldir gingið sína egnu leið.

Í Bhutan verður viðgongd máld í mun til økologiska, etiska og andaliga menning. Moralur og upplýsingarstøði telja meira enn materiell vælferð. Buddhistisk virði eru varðveitt. Kongurin Wangchuk sigur, at *"brutto tjóðareydna hevur størri týdning enn bruttotjóðarframleiðsla"*.

Í 1998 vitjaðu 500.000 ferðafólk grannalandið Nepal. Bhutan loyvdi ikki meira enn 6000 ferðafólkum inn í landið. Hvør einstakur ferðamaður fekk strong boð um, hvussu hann skuldi fyrihalda seg. Millum annað varð forboðið teimum at geva børnum góðgæti ella annað, tí tey skuldu ikki verða lærd at bidda.

Landið kundi havt stóra inntøku av timburútflutningi, men hevur noktað at høgga trø niður, tí tað skaðar umhvørvið. Planleggingarráðharrin hevur sagt: *"Vit vilja ikki kasta okkum treytaleyst inn í alt, sum er modernað. Vit royna tí at varðveita okkara mentan, okkara siðaarv, okkara virðisskipan og okkara mentanarstovnar."*

Men fangarmarnir hjá altjóða kapitalismuni røkka langt. Líka til Bhutan, har parabolantennur vaksa sum hundaland. Ávirkanin frá Vesturheiminum sæst longu væl. Kurvabóltur er vorðin tjóðarítrótt í staðin fyri bogaskjóting. *Boogie Woogie*, eitt sjónvarpsshow, sum Golcate stuðlar fíggjarliga, kappast við panoramaútsýnið til Himalaya. Teldupostur er komin í staðin fyri brævskriving, hóast tann elsta av teimum fýra konunum hjá kongi bjóðaði fólki at senda brøv ókeypis í 10 dagar fyri at forða hesari gongd. Børn, sum fara pílagrímsferð til kleystur at biðja, eru ílatin Spice Girls T-skjúrtur. Í høvuðsstaðnum Thimphu selja 25 privatar sølubúðir sjónbond. Sjálvt Bhutan, tað seinasta Shangri-La, er fallið. Landið loyvir vesturlendskari ávirkan, tí tað er ikki ført fyri at halda ímóti freistingunum og kann ikki halda fram við avbyrgingarpolitikkinum.

Støðan reisir nógvar spurningar. Hvussu long tíð gongur, til altjóðagerðin og tær frælsu marknaðarkreftirnar hava víggirt seg so væl, at tað vendist ikki aftur? Verður Bhutan ført fyri at finna eina millumleið? Fara mammon og MTV-mentanin skjótt at yvirtaka tann fagnað, Buddha hevur átt? Hvussu leingi aftrat kunna kongur og hansara fýra konur stýra búskapinum og átaka sær ábyrgdina av vælferðini hjá borgarunum?

Neyvan leingi, skula vit meta eftir gongdini aðrastaðni.

Men so leingi tað varir, hevur bhutanski staturin tað størsta fíggjarliga valdið, td er tað mesta av ídnaðinum statsogn, og staturin røkir fólksins vælferð. Tað sama var galdandi í USA og Evropa stóran part av farnu øld, til lat-standa-til-kapitalisman tók seg fram í 1970-unum og 80-unum. Áðrenn myndugleikarnir løgdu saman ástir við fría marknaðin.

## Keynes er vorðin ein fótnota

Síðst í 19. øld ásannaðu stjórnirnar í Evropa og USA, at staturin átti við ymiskum sosialum tiltøkum at tálma teimum ringastu avleiðingunum av kapitalismuni. Um miðju 20. øld høvdu flestu lond sett ávísar vælferðarskipanir í verk, ymiskar frá landi til land, men tó so, at flestu lond í Vesturheiminum veittu útbúgvingarstuðul, heilsutænastu, húsaella íbúðarstuðul og okkurt slag av inntøkutrygd.

Í Bretlandi td vaks parturin av bruttotjóðarframleiðsluni, sum varð brúktur til vælferðartænastur, úr 5% í 1945 upp í 20% í 1975. Í sama tíðarskeiði øktust útreiðslurnar til almennu heilsutænastuna úr 500 mió. pundum upp í slakar 6.000 mió. pund. Tað gekk seinni í USA. Har fór staturin ikki rættiliga at taka sær av fólksins vælferð fyrr enn í forsetatíðini hjá Kennedy og Johnson 1961-69. Í 1964 kunngjørdi Johnson *"nasjonalt kríggj móti fátækadøminum"*.

Samstundis gjørdist staturin nógvastaðni tann mest týðandi leikarin í búskapinum. Longu fyri seinna heimsbardaga fóru stjórnirnar í Vesturevropa at tjóðartaka ídnaðin. Undir kríggnum hevði staturin fult eftirlit við búskapinum, og tað helt í ein vissan mun fram eftir kríggið. Í staðin fyri ta neoklassisku liberalismuna, har marknaðurin stýrdi búskapinum, kom keynski búskapurin.

Búskaparfrøðingurin John Maynard Keynes helt, at myndugleikarnir bæði kundu og áttu at leggja seg út í búskaparviðurskifti. Eftir krakkið í Wall Street gjørdi hann eina nýggja búskaparliga læru. Hann mælti myndugleikunum til at økja tann fíggjarliga eftirspurningin og syrgja fyri arbeiði til allar hendur innan fyri rammurnar av einum blandingsbúskapi og einum vælferðarstati.

Síðst í 1940-árunum fór bretska arbeiðarastjórnin at fremja politikkin eftir læruni hjá Keynes í verki. Longu í 1946 bundu amerikansku myndugleikarnir seg til at virka fyri arbeiði til allar hendur, men sum nevnt varð ikki farið undir at fremja hetta í verki fyrr enn í sekstiárunum. Onnur lond í Vesturheiminum gingu somu leið.

Viðurskiftini broyttust, tá OPEC hækkaði oljuprísin heilt nógv síðst á árinum í 1973. Teir høgu oljuprísirnir gjørdu, at lønir og prísir ruku upp í loft, heimurin fekk lágkonjunktur, arbeiðsloysið gjørdist stórt, og í fleiri londum fór inflasjónin upp um 20%.

Læran hjá Keynes, sum hevði riggað so væl í 30 ár, var ikki før fyri at loysa trupulleikarnar. Politikarar vóru á einum máli um, at nú kravdist ein onnur búskaparlig stýring: ein strangari fíggjarpolitikkur og eftirlit við peninganøgdini. Fíggjarmálaráðharrar í øllum londum í Vesturheiminum løgdu dent á, at neyðugt var at basa inflasjónini og minka tær almennu útreiðslurnar. Treytirnar, sum fylgdu við lánum, vóru strangar. Í 1976 noyddist bretski fíggjarmálaráðharrin Denis Healey út at taka lán. Altjóða Valutagrunnurin IMF setti sum treyt, at Bretland minkaði tær almennu útreiðslurnar og basti inflasjónini.

Frá hesi løtu var hugsjónin hjá Keynes um tann sterka statin deyð ella doyggjandi. Á landsfundinum hjá Labour sama ár segði forsætisráðharrin James Callaghan: *"Vit hildu, at vit kundu koma burtur úr lágkonjunkturi og skapa arbeiðspláss við at… økja almennu útreiðslurnar. Eg sigi tykkum øllum erliga, at henda møguleikan hava vit ikki longur."* Í USA kom Carter forseti til somu niðurstøðu og skerdi almennu útreiðslurnar.

Noreena Hertz skrivar:

*"Tá tað leið móti endanum á sjeytiárunum varð Keynes – maðurin sum Vesturheimurin hevði fevnt og fylgt í royndunum at byggja uppaftur ein heim, oyðilagdur av kríggi, samstundis sum eitt trygt bulvirki móti kommunismuni varð bygt – burturvístur til eina fótnotu í søguni. Men hóast keynesianisman var burtursøgd, gingu nøkur ár, áðrenn eitt nýtt slag av kapitalismu við einari greiðari hugsjón kundi reypa av sigri. Í stjórnartíðini hjá Callaghan og Carter varð framvegis hildið, at staturin var til fyri at loysa inkonsekvensin í marknaðinum, at hann hevði ein týðandi leiklut í búskapinum."*

Δ